# Kunningarskriv frá Studna

## 1. Mínboks og talgildu umsóknarbløðini

Vit fara fyrst enn einaferð at heita á tykkum um at fáa tey lesandi at søkja talgilt. Hetta er nemmari fyri allar partar og ger, at vit kunnu útgjalda fleiri nýggjum lesandi studningin síðst í august.

Í sambandi við talgildu umsóknarmannagongdina fara vit at vísa til:

- viðheftu framløguna hjá Kristjan Petursson á Elektron 15. juni. Á aftastu síðu í framløguni verður víst til, hvar hjálp er at heinta í sambandi við Mínboks og Mínlykil. Kristjan beyð sær eisini at koma á lærustovnarnar, um neyðugt.
- heimsasíðu okkara www.studni.fo, har vegleiðing og trý videobrot við vegleiðing eru – trýst á bláa feltið "søk studning við Mínboks".
- at minna tey lesandi á, at hava tey **neyðugu** skjølini tøk á telduni (dóps- og navnabræv hjá børnum, p-tal hjá børnum, bústaðarváttan, vígslubræv, leiguváttan, skjalprógv fyri fastari flyting). Øll hesi skjølini eru sjálvandi ikki neyðug at viðhefta hjá øllum lesandi.
- at minna á, at viðheftu skjølini skulu vera í pdf-sniði.

Á heimasíðuni skuli.studni.fo liggur vegleiðing til tykkara, sum hava ábyrgd av at vátta, at lesandi eru lesandi við skúlan v.m. Tit, ið hava fingið hesa uppgávu við samtykki frá leiðslu skúlans, hava fingið brúkaranavn og loyniorð sendandi við telduposti frá Emil Sørensen á Studna. Um okkurt er at spyrja um í hesum sambandi, vendið tykkum so til Emil emil@studni.fo ella ringið til Studna. Minnist til at eftirkanna at **lestrartíðarskeiðið er rætt** útfylt hjá tí einstaka lesandi.

## 2. Leggið til merkis

- **Framhaldslesandi**, t.v.s. tey, ið ikki byrja nýggja útbúgving, skulu ikki søkja av nýggjum.
- **Framhaldslesandi á miðnámi** sum leiga, skulu á hvørjum ári senda nýggja Studna-leiguváttan og skjalprógv frá peningastovni, ið vísir, at húsaleigan verður goldin hvønn mánað framyvir, áðrenn hægri studningurin verður útgoldin. Hetta skal vera skermmynd (print-screen) frá netbanka ella váttan frá peningastovni. Hesi skjøl skulu tey lesandi skanna inn og senda okkum við telduposti.
- **Tey, sum søkja um barnastudningin**, skulu viðleggja navna- og dópsbræv og skjalprógv fyri, at barnið/børnini búgva hjá teimum. Hetta skjalprógv fæst við at venda sær til Landsfólkayvirlitið ella kommununa.
- Minnist til at boða frá beinanvegin, **tá lesandi ikki eru lestravirkin longur**, talan kann vera um at lesandi gevast, tímatalið fer niðurum tað ásetta kravið ella at lesandi eru meira enn eitt ár afturút í lesnaðinum. Minnist eisini til at boða frá, tá lesandi gevast við skúlaárskiftið.
- Um lesandi ikki søkir talgilt, ella lesandi skal senda okkum okkurt **skjal**, skal skjalið helst sendast **við telduposti**. Minnist til at upplýsa navn og føðingardag.
- Tey, ið skulu hava **lán**, søkja á sama hátt sum áður. Skuldarbrøvini (lánsskjølini) verða send tykkum innan 15. august.
- Vit fara eisini at minna á framløguna, ið **Strandfaraskip Landsins** sendi tykkum 16. juni. Her síggja tit nýggju mannagongdina hjá Strandfaraskipum Landsins. Framløgan og kunningarskriv teirra er eisini viðheft hesum skrivi.
- Mint verður á "Ábyrgdin hjá útbúgvingarstovnunum" í vegleiðingini, ið nú er ásett í kunngerð, sí punkt 6 í næsta broti.

## 3. Lógar- og kunngerðarbroytingar 1. august 2016

Einasta lógarbroytingin, ið er samtykt, er broyting, ið viðførir, at lestrarstudningurin ikki lækkar, upphæddirnar verða sostatt tær somu sum í fjør, sí http://www.studni.fo/get.file?ID=13672

Nakrar kunngerðarbroytingar eru gjørdar og verða tær lýstar fyrsta dagin. Tær eru galdandi frá 1. august 2016. Niðanfyri eru tær broytingar nevndar, sum eru viðkomandi fyri lesandi í Føroyum.

1) Dagføring av hvørjar útbúgvingar eru stuðulsheimilaðar (§ 1).
2) Broytingar í sambandi við ferðastudningin innanoyggja (§ 5):
    - Studnaferðakortini verða send skúlunum, sum við at geva teimum lesandi kortini, vátta yvirfyri Strandfaraskipum Landsins, at tann lesandi er lesandi við lærustovnin og at tey uppfylla treytirnar fyri at fáa studning frá Studna.
    - Harafturat verður í kunngerðini staðfest, at Studnaferðakortið er persónligt og at tann lesandi skal kunna skjalprógva, at viðkomandi er ánari av kortinum.
3) Barnsburðarfarloyvisstudningur kann nú eisini veitast frá upp til 3 mánaðum eftir føðing. Ásetingin verður gjørd fyri at fáa størri smidleika í barnsburðarfarloyvisskipanina. T.d. er tað av týdningi fyri lesandi, ið eigur barn um várið, at møguleiki er at bíða við at fara í barnsburðarfarloyvi til summarfríðtíðina uttan at missa ein part av barnsburðarfarloyvinum (§ 6).
4) Ein orðing í sambandi við verkætlanarstudningin er gjørd neyvari og er soljóðandi: "Størri uppgáva í sambandi við hægri lesnað. Talan skal vera um kanningarferð í sambandi við høvuðsuppgávu ella størri ritgerð, ið er kravdur partur av lestri, ið telur í minsta lagi 10 ects." (§ 22).
5) Smærri neyvlýsingar av ábyrgdini hjá teimum lesandi (§ 29).
6) Sum er, hava útbúgvingarstovnarnir stóran leiklut og ábyrgd í sambandi við lestrarstuðulin. Henda leiklut og hesa ábyrgd hava útbúgvingarstovnarnir havt síðani lestrarstuðulin varð yvirtikin frá donskum myndugleikum í 1988, men hevur hetta bert verið ásett í vegleiðing. Hesin leiklutur og henda ábyrgd eru nú ásett í kunngerð og er fylgjandi (§ 29a): "Í sambandi við umsitingina av lestrarstuðulinum skulu útbúgvingarstovnarnir:
    - Vátta, at tann lesandi gongur á eini stuðulsheimilaðari útbúgving sbrt. § 1.
    - Veita vegleiðing í sambandi við lestrarstuðulin og útfyllan av umsóknarbløðum um lestrarstuðul.
    - Vátta, at útbúgvingartíðarskeiðið, søkt verður um, er rætt útfylt.
    - Veita vegleiðing í sambandi við ferðastudningin innanoyggja.
    - Beinanvegin at boða Studna frá, tá ið lesandi gevast við lestrinum ella ikki eru lestrarvirkin sbrt. § 3 í lógini.
    - Vera millumliður millum Studna og tann lesandi í ymiskum spurningum, ið stinga seg upp.
    - Boða Studna frá viðurskiftum hjá lesandi, ið hava ávirkan á lestrarstuðulin."

## 4. Fyrstu útgjøldini

Lesandi, ið halda fram á somu útbúgving lestrarárið 2016/2017, fáa studningin fyri august útgoldnan síðst í august mánaði. Tað er tí týdningarmikið, at lærustovnarnir fráboða Studna í fyrstu viku av skúlaárinum, um lesandi eru givin við skúlaársskiftið.

Vit vilja gera alt fyri, at so mong av teimum, ið byrja eina nýggja útbúgving, fáa studningin fyri august síðst í august mánaði – jú fleiri, ið søkja talgilt, jú størri eru sannlíkindini fyri hesum. Tey, ið ikki koma við í august-útgjaldið, fáa august-studningin um hálvan september. Studningurin fyri september verður útgoldin síðst í september.

## 5. Vegleiðingar v.m.

Dagførdar vegleiðingar, umsóknarbløð, Studna-leiguváttan og umsóknarblað til barnsburðarfarloyvi liggja á heimasíðu okkara undir "umsóknarbløð", "lestrarstuðul í Føroyum".